LM-099/2023

Fylgiskjal 82

Trøllanes 23.02.2024

Hoyringsskriv til lógaruppskotið "Lóg um burðardygga ferðavinnu".

Undirritaðu vilja hervið seta fram okkara meining um omanfyri nevnda lógaruppskot.

Vit eru bóndahjún búsitandi á Trøllanesi, men tað mesta av okkara landbrúkið liggur í Mikladali. Tað verður tí mest sum íbúgvar á Trøllanesi vit úttalað okkum heldur enn sum bøndur, við øllum teimum stríðsspurningum sum hartil hoyra.

Lat tað verða sagt beinanvegin, at vit hava luttikið á øllum fundum, sum hava verið um lógaruppskotið her í norðoyggjum, íalt trimum fundum. Har hava vit úttalað okkum um lógaruppskotið, serliga á fundinum í Mikladali.

Tað eru fleiri ting í uppskotinum sum eru góð, men samanumtikið halda vit at lógaruppskotið er alt ov víðgongt, mótvegis høgum, náttúru og eigarum. Har eru eftir okkara tykki eisini fleiri manglar. Teir venda vit aftur til.

Ferðavinnan hevur av álvara tikið seg upp seinastu árini. Tað hevur broytt okkara gerandisdag rættiliga nógv. Tað má havast í mentu, at tá vit valdu at seta okkum niður her, í tí fjarskotnað, so var tað fyri at drívað landbúnað og gagnnýta tað tilfeingi sum liggur til jørðina. Á Trøllanesi er tað serliga fuglurin, sum mangan hevur verði eitt gott ískoytið til seyðahaldið. Landbúnað hava vit bæði lært til, og tað halda vit okkum verða góð til.

Fyri 20 árum síðani varð lundin fyri hóttafallið helst av manglandi føði. Hetta skerdi okkara inntøkumøguleikar nógv. Tó hava vit roynt at livað av seyðahaldið hesi árini. Fyri uml. 5 árum síðani sóu vit at stovnurin var mentur so mikið, at vit blivu samdir um at byrja at fleyga aftur í smáum. Fyrstu árini fleygaðu vit tó mest til húsbrúk, men seinasta ár fóru vit aftur í bjørgini. Tá vit nevnað hetta, so er tað tí, at verðandi fleygamenn eru 30 ára gamlir, og um vit ikki byrjaðu aftur, so høvdu hesir ungu menn – uppvaksnir á fuglaplássið - ikki hildi á stong í 20 ár. Harvið hevði siðvenjan helst dottið niðurfyri.

Í dag er bygdin av álvara merkt av ferðafólkastreyminum. Tað ber ikki til at fara við fleygastong, har sum man áður plagdi, orsakað av ferðafólkið. Lundalandið undir bygdini verður órógva av ferðafólkið, sum ikki duga sær hógv. Tað vil siga at vit íbúgvar mugu javnan eftir teimum, tí tey fara niður í lundalandið at takað myndir.

Fyri okkum íbúgvar á Trøllanesi í dag, er gerandis dagurin nógv broyttur, eisini í túninum. Tú mást til eina og hvørja tíð verða klárur at svarað spurningum, sum ein onnur kunningarstova. Tú mást finna teg í at verða avmynda í tínum dagliga yrki - so sum heingja klæðir út á snór. Arbeiðir sum at takað rabarbur, eplir o.a. upp úr jørðini, má gerast aftaná kl. 19, tá flestu ferðafólkini eru farin av oynni. Annars liggja myndir av tær úti á alnótini sama dag.

Fyri tveimum árum síðani gjørdi kommunan eitt parkeringsøkið uttanfyri bygdina. Tað hevur bøtt munandi um ferðslu ruðulleikan, sum var í bygdini áðrenn. Eisini er munandi batið at hómað, hvat viðvíkur bjarging av ferðafólkum, sum koma sær í

LM-099/2023

óførið, brótu seg sundur v.m. Her hevur tilbúgvingartænastan tikið sær av tí, uttan at vit bygdafólk verða stórvegis órógvað.

So til manglarnar í lógini.

Sera løgi tykir tað okkum at onki verður nevnt í lógini um dronuflúgving. Her hugsa vit serliga um bygdalívið og um fuglalívið. Vit hava upplivað fleiri ferðir, at fleiri dronur eru í luftini í senn, bæði í bygdini og úti á Kallinum. Tað er møguligt hjá dronum at flúgva heilt inn í bjørgini at avmyndað ritu og lomviga, sum liggja á eggið. Tað er óneyðugt at siga at hetta má verða til stóran bága fyri fuglin í búðtíðini, í ringasta førið kann hetta helst styggja fuglin burtur.

Eitt annað sum hevur vundið sera nógv uppá seg í ferðavinnuhøpið, eru skjóttgangandi bátar. Hesir hava til frægd at sigla við fullari ferð tætt upp undir land eisini har fuglabjørg eru. Hetta gevur harðar brestir frá sær tá teir sigla aldu av aldu. Hetta styggir fuglin. Havi eisini hoyrt at deyður fuglur er flotnaður upp aftanfyri slíkar bátar, men tað havi eg ikki upplivað sjálvur. Løgið at lógin onki nevnir um avmarkingar av hesum undirhaldið.

At enda vilja vit nevnað at vit eiga fýra vaksin børn, sum øllum dáma væl á Trøllanesi. Ein hevur keypt sær hús í Mikladali og búsett seg har. Hini kundu eisini gott hugsað sær at búsett seg í Kalsoynni, men hava ikki hug at seta seg niður á Trøllanesi, vegna árinini av ferðavinnuni. Tað er sjálvandi tí at tey ikki sjálvi hava hug at fáast við ferðavinnu. Havandi í huga manglandi búseting í útjaðaranum, so er tað sera hugstoytt at broytingin í gerandis mynstrinum, skal hava so stórar avleiðingar fyri hugin hjá ungfólkið at seta seg niður á smáplássum.

Kærar heilsur

Anja og Eyðun Eliassen
á Trøllanesi 9
Fo-798 Trøllanes